Studentar í Hoydølum:

## *Leið okkum ikki í freistingar…*

# Hash í dós

**Øll rúsevni finnast í Føroyum, tó er sera lítið av heroini. Mest verður selt av hash. Narkodeildin á politistøðini í Havn hevur til uppgávu á fáa tamarhald á og basa rúsevnismarknaðin í Føroyum**

RÚSEVNI
*Tóra Winther Reinert og Turið Johannesen*

Vit settu okkum fyri at fáa innlit í, hvussu roynt verður at steðga innflutningi av rúsevnum til Føroyar.

Við hesum í huga fóru vit at tosa við narkodeildina.

Á narkodeildini sita fimm mans og ein hundur. Teirra arbeiði byggir á 4 ára royndir innanfyri einum, ið kallast Narkotikabólkurin. Teir arbeiða 38 tímar um vikuna og til tíðir meir.

Fyri at fyribyrgja, at ung nýta rúsevnir undirvísa teir í fólkaskúlunum,og arbeiða í tøttum samstarvi við tollarnar, sum eisini hava hund. Saman kanna teir innflutningsstøðini. Tó kunnu rúsevnini verða funnin allastaðni. T.d. funnu teir einaferð eina sodavatnsdós, har botnurin var skorin undan og hash var fylt í. Botnurin var síðan límaður á aftur, og dósin var sett í eitt kartong av sodavatnsdósum. Hetta vísur okkum, hvussu kreativir smuglarnir kunnu vera. - og uttan hundin høvdu teir ikki funnið hetta.

Um rúsevnið kemur inn í landið, skulu teir finna teir, ið standa aftanfyri.

Teir arbeiða á ein annan hátt enn aðrir løgreglumenn og teir royna at vera anonymir. Í einum lítlum landi sum Føroyar kann hetta vera trupult. Summir seljarar kenna teir aftur, tó halda teir, at hetta er gott, tí teir síggja beinavegin á teimum, um teir goyma okkurt fyri teimum.

Fyri at fáa fatur á seljaranum verður ofta tosað við keyparan og annars fáa teir upplýsningar frá ymsum fólki. Í Føroyum kann løgreglan altíð rannsaka eitt hús um nóg stórur illgruni er til tess.



*Ovast frá vinstu: Barbara, Iris, Turið, Brynjálvur, Tóra, Eyðbjørn og Joan*

### Handtøka

Tá ið seljarar verða handtiknir skulu teir innan 24 tímar fyri ein dómara. Hetta verður kallað ein grundlógarhoyring. Undir grundlógarhoyringini hava teir ikki rætt til ein sakførara og heldur ikki til eina telefonsamrøðu. Ofta verða teir settir í isolatión, tá tað snýr seg um rúsevnismál. Tað fevnir um eina viku á gangin, ofta sita teir tvær tilsamans. Tað longsta tíðarskeiði, ið teir hava havt ein persón sitandi í isolatión er tveir og ein hálvan mánaða. Tá snúði tað seg um ein stóran seljara. Um viðkomandi fær abstinensir, verður viðkomandi oftast sendur til Deild 2 á Landssjúkrahúsinum, ið hevur sera framkomna viðgerð innan hetta økið. Revsingin fyri at hava verið ein stórseljari er um eini 3 ár. Men fá gramm skulu til fyri at fáa ein harðan dóm.

### Rúsevnini

Øll rúsevni finnast í Føroyum, tó er sera lítið heroin. Viðmerkjast kann, at kokain er sera lítið av og at stórar nøgdir av amphetamin eru at finna. Amphetamin kann líkjast hørðum tyggigummi. Eitt rúsevni, sum verður kallað Crack, er tað sterkasta rúsevni, ið til er. Tekur tú tað einaferð, so tekur tú tað restina av lívinum. Ecstasy er eitt kemiskt framleitt evni, sum er formað sum ein lítil tablett. Nógv ymisk evni eru í og ikki eru tey somu evnini í hvørjari tablett. Sera vandamikið kann vera at taka eina tablett av ecstasy, tí kroppuri kann gerast ovurviðkvæmur av henni og doyggja spakuliga. Eftir at tveir tímar eru farnir, kunnu læknarnir einki gera. Tey fáu, ið yvirliva eftir ein slíkan tilburð, blíva sjálvdan normal í høvdinum aftur. Ein sovorðin ecstasytablett kostar 250-375 krónur, og kann hava mong ymisk merki á sær, t.d. eina kanin. Harafturímóti er tað mest kenda rúsevnið í Føroyum hash og er so samstundis tað veikasta rúsevnið.1 gramm kostar umleið 125 krónur á gøtuni í Havn.

Politistarnir halda, at seljarin er óndsinnaður og at hann bara vil hava teg bundnan av rúsevninum, so hann kann fáa pening frá tær.

### Tollarnir

Teir forða rúsevnisinnflutninginum vid tolleftirliti, teir kanna ferðandi, skip, flogfør og farm. Eisini gera teir mangar stakroyndir, støðga fólkið í tollinum, kanna fraktina saman við hundinum, og halda eyga við móttakarum, ið virka misteinkiligir.

Teir samstarva við politi og tollarar uttanlands, sum siga teimum frá, um teinkjast kann, at okkurt er á veg.

### Starvsfólk mistonkt í innflutningsmálum

Vanliga verður ikki so nógv gjørt við slík mál, men um nóg nógvar áheitanir koma um ein serligan persón, so halda teir eyga við viðkomandi. Um teir halda, at viðkomandi er sekur, so verður hann handtikin. Síðani boða teir fraktdeildini frá og teir koyra persónin á politistøðina.

### Afturhildið rúsevni

Í 2003 var sera nógv afturhildið í Føroyum, Eini 50 kg, ið vóru á veg til Íslands, eitt sindur av ampfetamin og kokain. Her tosa vit um eini 5-20gramm. Politistarnir á narkodeildini søgdu, at sera sjálvdan koma teir út fyri at ecstasy kemur hendan vegin.

### Hundurin

Hundurin er vandur, so at hann snoddar øll narkotisk evni.

Hann kostaði 200.000 krónur og er keyptur í Svøríki.

At enda siga politistarnir seg fylgja væl við alla tíðina, bæði í býi og á bygd. Teir hava eftirlitið við øllum posti og teir halda altíð eyga við fólki, sum koma henda vegin…..men tað er eitt dult evnið, tí fáa teir ikki útalað seg meira um hetta.

# Úr Sandvík í Hoydalar

**Tvey syskinabørn hugleiða um at flyta heimanífrá**

UNG
*Barbara Thomsen og Iris J. T. Thomsen*

So leingi vit kunnu minnast, hava vit droymt um at ganga í student í Havn, og at vit skuldu búgva saman var eisini partur av ætlanini. Í august 2003 gjørdist hesin dreymur til veruleika, tá ið vit fluttu úr heimbygdini Sandvík til Havnar at ganga í Hoydølum. Eisini høvdu vit báðar fingið kamar á studentaskúlaheiminum í Berjabrekku.

Sjálvar halda vit tað vera ein fyrimun, at vit sum syskinabørn búgva í sama húsið. T.d hava vit verið úti fyri at missa ein av okkara kæru í heimbygdini og var tað tá ein góður stuðul at hava hvørja aðra, tí vit vildu tá sjálvandi vera saman við onkrum í familjuni.

Báðar hava vit arbeiði her í Havn og liggur tað soleiðis, at vit hava frí annað hvørt vikuskifti og fara vit tá suður.

Vit halda tað vera sera mennandi at flyta heimanífrá, tí at vit skulu jú øll ein dag standa á egnum beinum, og er hetta ein frálík byrjan.

Nevnast kann eisini, at vit virðismeta heimbygdina høgt, hóast vit ikki búgva har longur. Tað er deiliga friðarligt og avslappandi at kunna fara suður at slappa av av og á.

ítróttur
Nr. 53 • mikudagur • 17. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Útlendingastopp!

**Eitt ramaskríggj fer í hesum døgum gjøgnum føroyska ítróttaheimin. Eingi arbeiðsloyvi hjá útlendskum ítróttafólki verða endurnýggjað, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum**

ÚTLENDINGAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Sum skilst, so hava tey á Skála beinleiðis ætlanir um at taka liðið úr kappingini*

Føroysk ítróttarfeløg hava fingið ein ordiligan frammaná frá nýggja landsstýrismanninum í innlendismálum.

Frá fleiri síðum er nú at frætta, at landsstýrismaðurin hevur sett ein stoppara fyri innflutninginum av útlendskari arbeiðsmegi. Og at so er líkamikið, hvørt talan er um »vanlig« arbeiðsfólk, ella um talan er um ítróttarfólk, sum koma til Føroya at spæla fót-, flog-, hondbólt ella okkurt heilt annað. Og so er eisini líkamikið, hvørt talan er um nýtt loyvi ella um eina endurnýggjan. Svarið er nei!

Júst útlendsku ítróttarfólkini hava annars í stóran mun verið við til at lyfta støðið á føroyskum ítrótti, og tó at tað onkra tíð hevur givið eina skeiva kapping, so er einki at ivast í, at hetta er nakað, sum kann vera til stóran styrk hjá føroyskum ítrótti.

Nú skal tó vera slutt við hesum. Fleiri feløg hava í seinastuni havt umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi liggjandi, men hóast onkrar av hesum hava staðið á bíðilista í einar fimm mánaðir, er framvegis einki hent, og nú hava feløgini meira ella minni fingið at vita, at tey verða ikki avgreidd.

### Góðtaka ikki grundgevingina

Okkum eydnaðist tíverri ikki at fáa fatur á landsstýrismanninum, sum var staddur í tinginum fyrrapartin týsdagin.

Men hann hevur áður ført fram, at hann ivaðist í, hvørt tað var rætt at loyva fleiri útlendingum inn í landið, nú arbeiðsloysið í Føroyum er uppgangandi.

Men sambært teimum feløgum, sum vit hava havt samband við, so er hetta als ikki eitt argument, sum upp á nakran máta er haldbart.

Her tykist greiða støðan vera tann, at útlendsku ítróttarfólkini als ikki taka nakað arbeiði frá føroyskum arbeiðsfólki. Heldur siga tey tað vera soleiðis, at talan í at kalla øllum førum er soleiðis, at eitt arbeiðspláss í bygdini tekur ein útlending inn sum eitt slag av stuðuli til ítróttarlívið í bygdini. Og tað verður eisini frá flestum síðum lagdur dentur á, at talan ikki er um útlendingar, sum taka pláss frá føroyingum. Men at fyritøkurnar einamest gera hetta sum eitt slag av stuðuli til feløgini.

### Álvarsligar avleiðingar

Og sum skilst, so eru nøkur feløg, sum longu nú umhugsa at taka heilt álvarslig stig, um landsstýrismaðurin heldur fast um støðu sína.

Enn er einki alment komið út hesum viðvíkjandi, men sum skilst, so hevur leiðslan í ítróttarfelagnum á Skála beinleiðis tosað um at taka liðið úr kappingini, um hetta er endaliga støðan.

Skála hevur til komandi kappingarár havt ætlanir um at hava fimm útlendingar á liðnum, og í øllum fimm førunum eru bæði sáttmálar og arbeiðspláss komin í rættlag.

Tá arbeiðið við hesum byrjaði, tosaði táverandi landsstýrismaðurin um at gera økið viðvíkjandi fremmandum ítróttarfólkum smidligari, og tí varð ikki roknað við, at hetta fór at geva nakrar trupulleikar.

Nú kann Skála standa í terri støðu, at teir hava bundið seg til tríggjar leikarar, sum teir ikki sleppa at brúka. Gera hesir leikarar krav upp á tann peningin, sum felagið hevur bundið seg til í sáttmálum, skal felagið av við hópin av peningi, uttan at fáa nakað sum helst afturfyri, og tað meta tey vera tað sama sum at biðja felagið steingja bæði hurð og kassa.

Og tað er einki at ivast í, at tað eru fleiri feløg, sum hava somu støðu sum Skála. Flestu formenn, sum vit hava havt samband við, siga, at um hetta er støðan hjá landsstýrismanninum, so kann hann akkurát tað sama biðja ítróttin á smærru plássunum gloyma alt um at blanda seg í toppin, og so bara lata Havnina, Klaksvíkina og Runavík um hetta.

### Fundur týskvøldið

Men kanska er ikki øll vón úti hjá ítróttarfeløgunum.

Sum skilst, so skuldi ÍSF týskvøldið hava fund við sersambondini, sum flest øll verða rakt av eini broyttari umsiting av lóggávuni. Her verður helst talan um eina felags útmelding frá samlaða føroyska ítróttarheiminum, og so skal arbeiðast víðari politiskt við hesum.

Hvussu hetta verður gjørt, er so ikki greitt enn, men tað er einki at ivast í, at tað fer at verða fylgt væl við í diskussiónini komandi tíðina.



*Okkum eydnaðist ikki at fáa orðið á landsstýrismannin, men sum skilst, so hevur hesin givið boð um, at fleiri útlendingar sleppa ikki til landið*